ítróttur

Nr. 150 • hósdagur • 11. august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo




*Hóast tveir spælarar hava leikbann, so tykist hetta ikki vera nakað, sum broytir stórvegis upp á uppleggið hjá B36 til dystin. Á myndin venjarin hjá B36, Sigfríður Clementsen*

# Vit skulu út at spæla fótbólt

**Í B36 hava tey lagt stóran dent á fyrireikingarnar til dystin. Umstøðurnar til hesar eru eisini í toppi í Vildbjerg, har hópurin heldur til, og venjarin tykist ikki vera í iva um, hvussu hansara lið skal fara inn til dystin**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Í fjør vóru atfinningarsomu røddirnar nógvar í tali, tá B36 valdi at avgreiða útidystin móti lettiska Metalurgs eftir einum degi.

Ta ferðina varð úrslitið ein sekkur av teimum stóru, og tað kann ikki útilokast, at ein slíkur aftur kann koma móti sterka FC Midtjylland. Men fyrireikingunum bilar so einki hesaferð. Longu mánakvøldið fór B36-hópurin við flogfari til Billund, og eftir góðan tíma í bussi, varð steðgað í Vildbjerg, sum einans er eitt stórt korter frá SAS-areнuni, har spælast skal hóskvøldið.

Í Vildbjerg verður búð og vant á stóra frítíðardeplinum, sum er í býnum, og valla kann sigast annað enn, at umstøðurnar til fótbólt eru í toppi. 25 væl trimmaðir venjingarvallir liggja kring depilin, og umstøðurnar at eta, fáa massasju og annars bara at hvíla seg eru júst soleiðis, sum tær skulu verða.

## Týdning at ferðast tíðliga

Tað kann tó viðhvørt gerast heldur langligt, soleiðis bara at venja og hvíla, og millum annað tí varð týskvøldið eisini nýtt til eina bowling-ferð til Herning.

Her fingu vit orðið á Sigríður Clementsen, venjara hjá B36, og hann tóktist eisini vera sannførdur um, at góðar fyrireikingar og umstøður til hesar eru ein týðandi partur av tí spælinum, sum eitur altjóða fótbóltur.

– Vit gjørdu tað í øllum førum gott í Íslandi, og tí valdu vit at fara fram eftir sama leisti hesaferð. Ikki minst á tann hátt, at farið varð avstað í góðari tíð, soleiðis at tú fært vant og spælt á grasi. Og umstøðurnar hjá okkum í Vildbjerg eru heilt í topp. Tað er veruliga nakað, sum vit eru fegnir um.

Og góðu fyrireikingarnar vóru kanska eisini partur av góða avrikinum í Íslandi?

– Tað halda vit í øllum førum at tær vóru. Hesaferð er so talan um eitt heilt annað lið, so tað skal verða talan um meira enn bara fyrireikingar, um vit skulu røkka einum góðum úrsliti móti FC Midtjylland.

## Neyðugt við broytingum

Sum venjari hevur Sigfríður sjálvandi eisini havt eitt eyka vakið eyga við FCM hesa seinastu vikuna. Men hóast hetta hevur fevnt um meira enn bara vikuligu útgávuna av Onside, so tykist hann ikki vilja siga so øgiliga nógv um mótstøðuna.

– Sjálvandi hava vit hugt væl og virðiliga eftir teimum, men tað nýtist jú ikki at siga so nógv. Vit ikki, hvussu liðið hjá teimum fer at síggja út hósdagin, og móti einum føroyskum liði spæla teir helst ikki á sama hátt, sum teir gera í heimligu kappingini. Tað kann í øllum førum roknast við, at teir verða ein tonn meira framrættaðir.

So hjá tykkum ræður kanska fyrst og fremst um at skipa verjupartin nóg væl?

– Ja. Vit skulu standa rætt defensivt. Tað er ikki so øgiliga nógv meira at siga um tað.

Og tú verður so noyddur at fremja nakrar broytingar í mun til dystirnar móti ÍBV, nú tveir spælarar - Fróði Benjaminsen og Bergur Midjord - eru leikbannaðir.

– Ja. Har eru so tveir, sum eg ikki fái brúkt, og so má eg koyra tveir mans inn ístaðin.

So sjálvt uppleggið verður kanska ikki so nógv øðrvísi fyri tað.

– Nei. Tað verður nokk ein 4-2-3-1, ella hvussu tað eitur. Tað vil siga, at vit koma at hava ein mann á toppinum, og so tveir verjukendar miðvallarar. Tað vil siga, at á talvuni verður útgangsstøðið tað sama, sum tað var móti ÍBV.

Venjarin vil ikki seta nøkur nøvn á, men ein upplagdur møguleiki er í øllum førum, at Klæmint Matras fer at røkja miðverjusessin saman við Pól Thorsteinsson, eins og teir gjørdu tað móti HB. So er spurningurin, hvørt ein nýggjur maður kemur inn á miðvøllin saman við Mikkjal Thomasen og Inga Højsted. Ella um Allan Mørkøre verður tikin aftur á hetta plássið, meðan Óbi fer at stríðast á einsamalla álopssessinum.

## Vilja hava nakað burturúr

Tá tosið snarar seg inn á sjálvt úrslitið og vónirnar til hetta, vil B36-venjarin ikki leggja nøkur tøl á borðið. Men hann er avgjørdur í, at tað er umráðandi hjá liðnum, at lærdómur og upplivingar koma burturúr.

– Eitt gott úrslit er, at vit fáa nakað fótbóltsligt burturúr. Eg vil ikki hava, at vit bara skulu standa afturi í verjuni og gúppa bóltin niðan, men vil hava okkum at royna at spæla okkum niðaneftir. Tað ræður um at njóta upplivingina, og at fáa nakað fótbóltsliga burturúr.

So tað verður ikki eitt B36 lið, sum fer at standa við 10 monnum í brotsteiginum, sum áskoðarnir fáa at síggja hóskvøldið.

- Tað læra vit einki av, og so hava vit einki fingið burturúr, staðfestir venjarin at enda.

# UEFA-Cup smakkar av meira

**Setningurin er ikki ókendur fyri altjóða føroyska luttøku. Tað ræður um at standa rætt, og halda mótstøðuni frá møguleikum. Og so annars at taka av, um møguleiki býðst, heldur Mikkjal Thomasen hjá B36.**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein av teimum meira royndu spælarunum hjá B36, sum hóskvøldið skal royna seg í næsta umfarinum í UEFA-Cup kappingini er Mikkjal Thomasen. Bæði í HB og B36 hevur hann fyrr verið partur av altjóða dystum, umframt at hann eisini eitt stutt skifti var í landsliðshitanum hjá Allani Simonsen.

Hann var eisini sjálvskrivaður partur av liðnum, sum ólavsøkuaftan vann søguliga sigurin á ÍBV, men hóast hetta førdi B36 eitt fet víðari í kappingini, so tykist Mikkjal ikki vera somikið nøgdur, at hann vil seta punktum við hesum.

– Vit eru sjálvandi øgiliga væl nøgdir um at hava spælt okkum víðari, men síggja eisini møguleika at koma enn eitt fet víðari.

– Vit vita, at FC Midtjylland hevur eitt betri lið enn, og spæla teir upp til sítt besta, so er okkara møguleiki ógvuliga lítil. Men hinvegin, so eru vit til reiðar at taka av, um teir ikki eru nóg fokuseraðir.

Nú er FCM eitt lið, sum hoyrir til betra endan av superliguni, og í løtuni eru teir á einum fjórða plássi. Hvussu nógv kenna tit til teir?

– Fleiri av okkum fylgja væl við í superliguni, so vit vita, at talan er um eitt rættiliga komplett lið. Teir duga væl at gera sær dælt av møguleikunum, og á heimavølli eru teir sera sterkir. So vit kenna nakað til teir. Men hinvegin er trupult at ímynda sær teirra styrki í mun til okkum. Tað er nakað, sum tú ikki merkir, fyrr enn tú stendur á vøllinum.

## Svár leikbann

Sum um uppgávan hjá B36 ikki er nóg stór, so er liðið eisini skert, nú tríggir spælarar eru burtur frá. Herbert í Lon Jacobsen er skaddur, og hann er als ikki við í ferðalagnum til Danmarkar. Tað eru Fróði Benjaminsen og Bergur Midjord hinvegin, men hvørgin teirra fær tikið lut í fyrra dystinum, tí teir báðir longu hava fingið tvey gul kort í kappingini.

Og spurdur um hetta sigur hart arbeiðandi miðvallarin, at hetta heilt víst er ein vansi fyri liðið.

– Tað merkir øgiliga nógv, og eftir mínum tykki, so ger tað liðið hjá okkum munandi veikari, enn tað annars vildi verið.

Og tað at menn sum Herbert og Fróði eru burtur. Ger tað uppgávuna á miðvøllinum enn truplari, tá hetta helst merkir, at Klæmint Matras verður partur av verjuni?

– Eg vil siga, at tað sum heild á øllum liðnum, so hevur Fróði nakrir sera týdningarmiklar eginleikar. Hann megnar at halda trýstinum burtur við at koyra bóltin runt. Og hann vinnur eina rúgvu av nærdystum. Ikki minst í luftini, og tað ger, at vit koma at brúka so nógva orku upp á aðrubóltarnar.

– Og Bergur verður heilt víst eisini ein missur. Ikki minst í hesum høpinum, tí júst teir báðir dystirnir móti ÍBV vóru kanska teir, har hann stóð seg best, heldur Mikkjal.

## Teir fáa tað ikki lætt

Men skerdir ella ikki, so skulu B36'arnir í eldin hóskvøldið. Og her verður uppgávan fyrst og fremst at dyrgja eftir einum so góðum útgangsstøði til seinna dystin, sum tað nú einaferð ber til.

– Vit fara inn í vónini um, at teir kanska undirmeta okkum eitt sindur. Og at teir so verða bilsnir av, hvussu væl skipaðir vit eru. Standa vit væl og rætt á vøllinum, soleiðis sum eg rokni við, so verður tað ikki lætt hjá teimum at skora. Tað eri eg rættiliga sannførdur um. Tað skal í øllum undra meg, um vit koma út fyri einum sovorðnum tapi, sum vit fingu móti AB á sinni. Ta ferðina var talan eftir mínum tykki slettis ikki um eitt so gott B36-lið sum tað, ið vit nú hava, sigur Mikkjal Thomassen at enda.